# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Fróði Durhuus 60 ár

Mikudagin 10. septembur verður Fróði Durhuus 60 ár. Fróði er føddur og uppvaksin í Vestmanna, og búsitandi í Árdal, Norra.

Fróði er elsti sonur Hans Martin Emil Frits Jacobsen Durhuus (Hassa) úr Vestmanna og Elisabeth f. Petersen á Steig í Sandavági. Fróði er elstur av sjey systkjum.

Í barnaárum dámdi Fróða væl at fáast við bátar og fisking. Hann var mangan túr Eysturi undir land og á Oyrargjógv við ferðafólki. 12 ára gamal var hann sín fyrsta túr til skips við Venus. Hetta var jólatúrin undir Ísland. 17 ára gamal fór hann sín fyrsta túr til Grønlands við Venus, sum pápin førdi.



Í 1967 fór Fróði til Klaksvíkar á telegrafistskúla og í januar 1968 byrjaði hann á skiparaskúla. Hann tók báðar útbúgvingar samstundis og fekk telegrafist- og skiparabræv í 1968. Hareftir fór hann út at sigla sum skipari við fraktskipinum Kristian Holm, ið fyri tað mesta sigldi millum Føroyar og Danmark. Nakrir túrar vóru til Portugal og Spania við fiski og eisini gekk leiðin til Amerika, har teir sigldu millum Bahama og Jackstonville. Ein túr vóru teir í Bangladesh fyri Unicef, har bleiv skipið álopið orsakað av kríggi.

Fróði gavst við Kristian Holm tá Vestfinnur, sum p/f Vestur í Vestmanna átti, bleiv bygdur í Aberdeen.

Fróði sigldi sum skipari við Vestfinni til hann, saman við bróðrinum Suna og pápanum Hassa, keyptu Columbus í 1976. Fróði silgdi sum stýrimaður við Columbus til hann í 1981 gjørdi av at leggjast uppá land og byrjaði á Føroya Fiskasølu, har hann var í nøkur ár.

Fróði hevði stóran áhuga í aling, og hann byrjaði í 1982 egið alibrúk við Áirnar, norðanfyri Hósvík. Seinni keypti hann, saman við øðrum, laksasláturvirkið Laxfisk í Hósvík. Fyrst í 1990'unum steðgaði hetta virksemi, og Fróði og Anthonia gjørdu av at flyta til Noregs á vári í 1992.

Fyrsta árið búðu tey í Stavanger, men fluttu síðan til Árdal, har tey í dag búleikast í egnum húsum. Fróði arbeiður sum planleggingarstjóri hjá Marine Harvest Norway og Anthonia arbeiðir í framleiðsluni hjá Marine Harvest í Hjelmeland. Fróði er sera virkin í nærumhvørvinum. Í frítíðini dáma teimum væl at fara á flot við Onnu av Árdal, ið er teirra egni heimasmíðaði bátur. Annars dámar teimum væl at fara biltúrar í Noregi, har tey uppliva tað norsku náttúruna. Tey vitja eisini í Føroyum á hvørjum árið.

Fróði er giftur við Anthoniu f. Hansen úr Hósvík og tey eiga tvey børn. Kim Durhuus og Emly Olsen. Kim er giftur við Anniku Jacobsen og tey hava 3 børn. Emly er gift við Esmari Olsen og tey hava 4 børn. Kim og Emly eru, við familjum, búsitandi í Hósvík.

Tey, ið ynskja at heilsa uppá Fróða, eru vælkomin í Róðrarneystið í Hósvík mikukvøldið 10. septembur frá kl. 18.00.

Vit ynskja Fróða til lukku við 60 ára degnum.

## Janus Kamban

Janus Kamban er seinasti umboðsmaður fyri fyrsta føroyska ættarliðið av myndlistafólkum, sum eftir kríggið tóku heim við sær hetta í føroyskum høpi nýggja listarliga økið. Sum rættir slóðarar góvu teir við margfeldi sínum íkast í, at tað kyknaði upp eitt medvit um virði av hesari listagrein og týdning hennara fyri tann listarliga føroyska samleikan.

Listafelagið var sett á stovn undir krígnum, meðan teir enn búleikaðust í Keypmannahavn. Seinni kom tann siðbundna Ólavsøkuframsýningin, eins og Janus Kamban saman við Ingálvi av Reyni og Jack Kampmann settu á stovn fyrsta føroyska listaskúlan.



Janus Kamban hevur sum listamaður givið sítt íkast í fleiri týdningarmiklum skreytbúgvingararbeiðum. Grafisku verk hansara hava eitt tíðarleyst einfeldi, sum enn í dag eru fyrimyndarlig. Stramma skapið á høggmyndini lyftir gerandismyndevnið upp í ein annan heim. Við kærleika og við eyga fyri vakurleikan í gerandisdegnum og fólkum í dagliga yrki teirra hevjar hann hesi evni til stóra list.

Sum listafólk hevur Janus Kamban útint almikið. Eisini sum menniskja, tí hann ikki einans hugsar um sína egnu list, men altíð hevur hjálpt og stuðlað øðrum listafólkum í einsliga arbeiði teirra.

Á Listasavni Føroya hevur Janus Kamban sett síni djúpu spor. Hugburður hansara til listina og fatan hansara av at vera listafólk eyðkennir eisini í dag virkið á listasavninum. Hann er vegvísari, so listin kann verða til gleði fyri mong og ikki bara fyri tey fáu, fyri ein avmarkaðan skara.

Við hesum orðum takka vit Janusi Kamban fyri sítt trúfesti og ynskja honum hjartaliga til lukku við føðingardegnum.

**Listasavn Føroya**
**Helgi Fossádal,**
**savnsleiðari**

## HD túrur í Føroyum

Mánadagin kemur eitt ferðalag við motorsúkklum við Norrønu í sambandi við at Harley-Davidson Club Føroyar (HDCFO) hevur bjóðað motorsúkkluáhugaðum til Føroya í tíðarskeiðinum 15. –18. september 2008.

Mánadagin verður tíðindafundur hjá Harley Davidson í Jónas Broncksgøtu og um kvøldið verður farið til Kirkjubøar og vitjað verður hjá áhugafelagnum Føroya Ellisakførum.

Týsdagin verður farið til Eysturoy og Norðoyggjar, og mikudagin gongur leiðin til Vágar, har vitjað verður á ymiskum støðum.

Áðrenn ferðalagið fer av landinum aftur hósdagin verður farið niðan í Mjørkadal og niðan á Sorenfelli.

### Faroe Islands Gathering

Navnið á hesum tiltaki er Faroe Islands Gathering og endamálið er at vísa øðrum motorsúkkluáhugaðum uttanlands møguleikarnar fyri at íðka okkara ítriv í Føroyum, umframt at skapa vinabond við onnur motorsúkklu áhuga uttanlands. Skipað verður millum annað fyri motorsúkkluútferðum kring oyggjarnar og øðrum tiltøkum, ið vísa hvat vit hava at bjóða

Royndirnar vísa eisini at ein av styrkjunum við HDCFO er at fáa samband við onnur lokal motorsúkklufeløg á uttanlandsferð okkara og hetta er við til at gera hesar ferðir til nakað heilt serstakt - framum aðrar ferðahættir.

Við at skipa fyri Faroe Islands Gathering vóna vit at økja og styrkja um hesi vinabond. Ætlanin er at tiltakið skal verða aftur vendandi um ikki hvørt ár, so við jøvnum millumbilum.

Í HDCFO eru í dag umleið hálvthundrað aktivir limir og í viðtøkunum fyri felagið stendur at endamálið er at skipa fyri sosialum tiltøkum við felagskoyring og at hava upplýsandi tiltøk um Harley-Davidson motorsúkklur.

Síðan felagið varð stovnað á sumri 2007 hava limir felagsins skipað fyri framsýning av Harley súkklum, felagstúrum í Føroyum og uttanlandsferðir.

Meira kunning fast við at enda sær til hdc@hdc.fo og við at vitja á www.hdc.fo.